ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 7. juli 2009




Kristjan á Neystabø, formaður í B36, og Christian Restorff Mouritsen skrivaðu í gjár undir sáttmála
Mynd: www.b36.fo

# B36 styrkir miðvøllin

**B36 hevur skrivað sáttmála við liðskiparan hjá føroyska U21-landsliðnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Christian Restorff Mouritsen spælir við B36 tað, sum eftir er av hesum kappingarárinum. Tað upplýsir B36 á heimasíðu sínari.

Christian hevur verið roknaður sum ein av evnaríkastu spælarunum í Føroyum, og í fleiri ár var hann knýttur at Manchester City.

Skaðar hava tó darvað honum nógv - eisini eftir at hann í fjør summar vendi heim til barndómsfelagið, HB.

Har hevur tað ikki eydnast honum at bíta seg fastan á besta liðið hjá felagnum í ár, og nú hevur hann so valt at royna eydnuna hjá grannunum.

# Mortan úr Hørg til AB

**Mortan úr Hørg spælur við AB komandi mánaðirnar**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*




Mortan úr Hørg hevur havt ilt við at vinna sær pláss á liðnum hjá HB í ár. Nú fer hann at spæla við AB
Mynd: www.ab.fo

Heimasíðan hjá AB staðfestir í kvøld, at Mortan úr Hørg spælur við uppflytarunum komandi mánaðirnar.

28 ára gamli Mortan úr Hørg, sum er uppvaksin í Sumba, hevur seinastu fýra árini spælt við HB, har hann í hesum kappingarárinum hevur havt trupulleikar við at vinna sær pláss í byrjunaruppstillingini.

Verjuleikarin hevur spælt fimm altjóða landsdystir fyri Føroyar.

# Renna í Runavík

**Í kvøld klokkan 18.30 verður skipað fyri rennikapping í Runavík**

RENNING
*Tíðindaskriv*

Kappingin, sum er 4. umfar í Grand Prix kappingini fyri vaksin hjá FÍF, er eisini kapping um FM heiti í 10 km renning á vegi.

Eins og undanfarin ár verður byrjað omanfyri Litaval. Runnið verður úteftir til Sjómansheimið, har sneitt verður oman á keiina. Síðan verður runnið inn eftir Gulasteinsvegi og niðan á vegin áraka Føroya Banka, har sneitt verður úteftir aftur. Henda leið skal rennast góðar 9 ferðir.

Seinastu ferð koma rennararnir á mál við Sjómansheimið.

Hendan rutan verður vanliga nýtt í Várkappingini, og verður mett at vera ein tann skjótasta 10 km rutan í landinum.

Kappast verður í hesum bólkum, ið allir renna 10 km:
Kvinnur opin bólkur (f. -1993)
Menn opin bólkur (f. – 1993)
Kvinnur (K45+) f. 1963-1954
Menn (M45+) f. 1963-1954
Kvinnur (K55+) f. -1953 ella fyrr
Menn (K55+) f. -1953 ella fyrr

www.taks.fo

TAKS

## KT-leiðari

**Ert tú** til eina avbjóðing?

**Hetta starvið** setur krøv til tín kunnleika, eldhuga og kreativu evni.

**Tú verður** leiðari fyri netfyrisitingini hjá TAKS. Fýra fólk starvast á KT-deildini hjá TAKS, tú verður leiðari hjá teimum, men tú verður eisini partur av felags netfyrisitingini í Fíggjarmálaráðnum, sum húsast á Argjum.

**Tú fært** ábyrgdina av dagføringum, viðlíkahaldi av KT-skipanunum og okkara KT-netumhvørvi. Tú fært eisini ábyrgdina av KT-trygdini.

**Tú kemur** saman við leiðsluni á TAKS at gera langtíðarætlanir og seta mál fyri KT-eindina. At samskipa KT- menningina á øllum stovninum. At leggja til rættis og leiða KT-verkætlanum. At røkja samstarvið við uttanhýsis KT-veitarar. At umsita og skjalafesta infrakervið.

**Vit vænta**, at tú hevur viðkomandi útbúgving. Kanst tú vísa á royndir sum leiðari og verkætlanarleiðari, er hetta ein fyrimunur.

Eisini vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevnir og dugir væl at arbeiða í toymi. At tú dugur væl at skipa arbeiði, hevur fokus á loysnir og megnar at taka avgerðir.

**Starvið verður lønt** sambært sáttmála millum landstýrið og viðkomandi yrkisfelag. Møguleikar eru fyri eftirútbúgving.

**Meira fæst** at vita um starvið við at venda sær til Eyðun Mørkøre, settur stjóri, á telefon 352600, ella undanfarna KT-leiðaran, Fróða Danielsen á telefon 216884.

**Send umsókn** saman við avritum av prógvum, ummælum og CV til TAKS í seinasta lagi 3. august 2009, kl 15.00. Merkt: umsókn KT-leiðari.

**T-postur:** taks@taks.fo ella **Postadressa:** TAKS · Postsmoga 2151 · FO-165 Argir

**TAKS** er ein stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at umsita toll- og avgjaldsskattalóggávuna og innheintingar innan málsøkini hjá stovninum. **TAKS** hevur 135 starvsfólk og er skipað við einari høvuðseind á Argjum og trimum skrivstovueindum runt landið.